UTTAN ÚR HEIMI

Iran hevur ikki kjarnorkuvápn

Um stutta tíð fer altjóða kjarnorkueftirlitið IAEA at kunngera, um Iran hevur ella er í ferð við at útvega sær kjarnorkuvápn, soleiðis sum amerikanska stjórnin heldur uppá.

Men longu nú tykist greitt, at svarið verður nei, skrivar New York Times. Sambært blaðnum hevur kjarnorkueftirlitið fingið eina spildurnýggja frágreiðing um viðurskiftini í Iran, og har kemur greitt fram, at Iran hevur eingi kjarnorkuvápn, og at landið heldur ikki er í ferð við at fáa sær slík vápn.

USA hevur leingi lagt iransku myndugleikarnar undir at hava ætlanir um at fáa sær kjarnorkuvápn. So seint sum mikudagin segði Colin Powell, uttanríkisráðharri, at USA ætlar at leggja málið fyri ST-trygdarráðið. Men New York Times skrivar, at tað nyttar einki, tí hvørki tey evropeisku limalondini ella Russland taka undir við tí. Bush, forseti, hevur fyrr sagt, at hann fer at royna at fáa eina diplomatiska loysn á ósemjuni við Iran.

Ósemja um rækjuprís

Svenskir fiskimenn hava leingi ilskast inná, at norskar rækjur eru so bíligar á svenska marknaðinum, at sviar hava ongan møguleika at kappast um prísin. Tað hevði millum annað við sær, at seinasta vetur noyddust svenskir fiskimenn at koyra 65 tons av rækjum burtur, tí teir sluppu ikki av við tær.

Men nú skal endi fáast á hesum. Í dag hittast umboð fyri fiskimannafeløgini í teimum báðum londunum at loysa trupulleikarnar. Sviar siga, at tær norsku rækjurnar ero so bíligar, at prísurin er niðan fyri minstaprísin hjá ES, og teir hava tí hótt við at ákæra Noreg fyri prísdumping. Sviar ásanna, at talan er ikki um tær stóru nøgdirnar, men teir vísa á, at norska rækjusølan til Svøríkis er vaksandi. Eitt nú er sølan vaksin heili 44 prosent tað seinasta árið, samstundis sum prísurin er fallin 16 prosent.

Í norska fiskimannafelagnum siga tey seg ikki hava fingið nakað prógv fyri, at tær norsku rækjurnar verða seldar fyri ein prís, sum liggur niðan fyri minstaprísin hjá ES. Felagið er kortini sinnað at kanna, hvussu ósemjan kann loysast, skrivar Aftenposten.

Yukos nærkast lønarsteðgi

Russiska oljufelagið Yukos kunngjørdi í gjár, at fær felagið ikki fatur á pengum, sum myndugleikarnir hava lagt hald á, noyðist tað skjótt at gevast við at gjalda skatt og lønir.

Russisku skattamyndugleikarnir hava kravt fleiri milliardir krónur frá oljufelagnum tí tað hevur ikki goldið nóg nógvan skatt í fleiri ár, og tí hava myndugleikarnir lagt hald á pengar, sum felagið eigur í ymsum bankum. Keldur í Moskva søgdu í gjár, at hetta kann fáa so álvarsamar avleiðingar, at Yukos kanska verður noytt at skrúva oljukranarnar fyri um stutta tíð, tí uttan pengarnar megnar felagið ikki at gjalda starvsfólkinum løn.

Yukos er eitt av teimum heilt stóru oljufeløgunum, og tíðindini um, at felagið kanska noyðist at steðga framleiðsluni, hevur longu ávirkað oljuprísin á altjóða marknaðinum og kann fáa uppaftur størri ávirkan seinni, skrivar Reuters.

Nógv skiljast

Í nítiárunum fækkaðu hjúnarskilnaðirnir í Noregi, men nú vísa tøl hjá hagstovuni í Oslo, at vend er komin í.

– Fólk hugsa meiri um sína egnu tilveru og krevja meiri av hvør øðrum nú enn fyrr. Tey flestu hugsa meiri um, hvat tey kunnu fáa burtur úr hjúnarlagnum, enn hvat tey kunnu geva tí, sjálvt um tað er greitt, at báðir partar mugu lata sítt, sigur Åsa Rytter Evensen, sum er samlívsráðgevi og lækni, við Dagsavisen. Hon leggur afturat, at ósemja í hjúnarlagnum tykist vera nógv meiri vanlig nú enn fyrr. Tað ávirkar børnini, og tí væntar hon, at hjúnarskilnaður verður uppaftur meiri vanligur, tá tey, sum nú eru børn, verða vaksin.

Ein annar norskur samlívsráðgevi, Solveig Vennesland, heldur, at fólk leggja størri dent á arbeiðið og børnini enn kærleikan, og tað hevur óhepnar avleiðingar fyri hjúnarlagið, sigur hon.

Gíslatøkan í Beslan kann elva til rok í øllum Kaukasus

Tað veruliga endamálið við gíslatøkuni í Beslan er ikki at útvega Kekenia sjálvsstýri, men at ræða russar, siga yvirgangsserfrøðingar. Eitt álop á skúlan kann elva til rok í øllum Kaukasus

GÍSLATØKA
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Tey bíða og biðja uttan fyri skúlan í Beslan. Í gjár ljóðaði, at gíslarnir eru ikki 350, men kanska 1.500 í tali

Gíslarænararnir í skúlanum í Beslan hava kravt, at Russland skal taka sínar hermenn úr Kekenia, og at lýðveldið skal fáa sjálvsstýri.

Men serfrøðingar halda ikki, at tað er tað veruliga endamálið við gíslatøkuni.

– Teirra einasta endamál er at ræða tað russiska fólkið. Gíslarænararnir vilja vísa, at allir russar eru í vanda, sigur hernaðarserfrøðingurin Alexander Golfs við AP-tíðindastovuna. Hann sigur, at ein tílíkur tilburður gevur Vladimir Putin, forseta tvinnar kostir í at velja. Annaðhvørt má hann lata seg og Russland eyðmíkja, ella má hann offra mannalív. Sjálvur ivast Golfs ikki í, at Putin tekur ta seinnu loysnina, er tað neyðugt.

Ein annar serfrøðingur, Yuri Korgunyuk, hevur somu áskoðan. Hann sigur við AP, at tað er heilt burturvið at hugsa sær, at Russland fer at taka hermennirnar úr Kekenia, ella at Kreml fer at broyta sín politikk har.

Andrei Piontkokovsky á hernaðarliga granskingarstovninum í Moskva sigur við Reuters, at gíslatøkan kann elva til rættiligt rok í øllum Kaukasus.

– Gera myndugleikarnir av at leypa á skúlan, og nógv børn doyggja, fer Norður-Ossetia og alt Kaukasus í luftina. Men tað er júst tað, gíslarænararnir ætla, sigur hann.

Meiri enn ein millión flýdd undan Frances

Í dag herjar tropiska ódnin Frances fyrireikað seg til Florida. Meiri enn ein millión fólk eru flýdd undan ódnini

ÓDNARVEÐUR
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Seinastu dagarnar hava fólk í Florida fyrireikað seg til ódnina Frances. Í gjár søgdu veðurmenninir, at ódnin var linkað nakað, men tað boðaði ikki fyri góðum, søgdu teir, tí tað merkir vanliga, at hon versnar aftur, áðrenn hon kemur inn yvir land.

Guvernørurin í Florida, Jebb Bush, hevur sett statin í undantaksstøðu, og myndugleikarnir hava biðið fólk fara burtur frá strondini. Á vegunum sást, at fólk hava tikið boðini til eftirtektar, tí bilaraðirnar vóiru langar. Hildið verður, at umleið 1,2 millión fólk valdu at rýma frá húsi og heimi undan Frances.

Fyri góðum fjúrtan døgum síðani herjaði tropiska ódnin Charley Florida. Tá doyðu 15 fólk, og ódnin gjørdi skaða fyri minst 50 milliardir krónur.

Fakfeløg ímóti Bush

Tey amerikonsku arbeiðarafeløgini ætla at fáa sínar limir at atkvøða fyri demokratiska valevninum, John Kerry

VALSTRÍÐ
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Arbeiðararørslan í USA vil ikki hava George W. Bush, forseta at halda fram í Hvítu Húsunum, og tí fara umleið 15.000 sjálvboðin at royna at ávirka veljararnar, so teir heldur velja demokratiska avbjóðaran, John Kerry.

Viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum eru partur av valstríðnum, og demokratarnir hava lagt dent á, at nógvir amerikanarar eru vorðnir arbeiðsleysir, síðani stjórnin hjá Bush tók við.

– Limir okkara hava ongantíð verið so virknir og eldhugaðir sum hesaferð, tí teir síggja, hvussu politikkurin hjá Bush hevur ávirkað teirra viðurskifti, sigur John Sweeney, sum er formaður í amerikanska landsfelagsskapinum AFL-CIO.

Átakið hjá arbeiðararørsluni verður miðsavnað um teir statirnar, har ivi er um, hvør fer at vinna.

ítróttur

Nr. 168 • leygardagur • 4. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Trýstið er altíð har

John Petersen heldur sjálvur, at kritikkurin ikki var heilt rættvísur eftir dystin móti Malta, og sjálvur ætlar hann í øllum førum at tippa hendan leygardagin

LANDSLIÐSTOS
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

Og at eg ikki skal tíma at spæla fótbólt. Tað er so nakað, sum eg sjálvur geri av, staðfestir John Petersen

Basel, Sveis: Hóast talan gjørdist um sigur á Malta herfyri, so var tað langt ífrá, at føroyska avrikið var nóg nøktandi í allar mátar.

Ein av leikarunum, sum í miðlunum fekk fleiri fleingjur, var John Petersen. Hann hevur annars átt púra tryggan sess á landsliðnum seinstu nógvu árini, men spurnartekin verða nú sett, hvørt hansara tíð á liðnum er um at vera runnin.

Tá vit eftir seinnu venjingina hósdagin fingu orðið á John, tóktist hetta tó ikki at vera nakað, sum hann bar størvegis ótta fyri. Ella sagt øðrvísi, so var óttin ikki størri, enn hann plagar at vera.

- Eg haldi ikki, at mítt pláss er undir størri trýsti, enn tað hevur verið. Men mína vegna er tað helst gott, at tað ikki eru bløðini, sum seta liðið. Tað eru venjararnir, sum svara tí spurninginum, og so mugu teir gera av, hvør spælir hvar.

Men heldur tú sjálvur, at kritikkurin eftir dystin seinast hevur verið í lagi?

- Tað er væl hugsandi, at eg havi spælt betri landsdystir, enn júst handan móti Malta. Men hinvegin haldi eg heldur ikki, at eg datt púrasta úr dystinum. Og at eg ikki skal tíma at spæla fótbólt. Tað er so nakað, sum eg sjálvur geri av, staðfestir John Petersen, sum roynt leikarin.

Og hann tykist eisini ætla sær at tippa kritikkin, um hann fær møguleikan á vøllinum leygardagin.

- Tað ger sjálvandi, at tú hevur nakað at prógva. Eg haldi eisini, at eg havi verið ógvuliga uppsett til venjingarnar, so eg kann vísa millum øðrum fjølmiðlafólkunum, at teir eru farnir skeivir. Tíbetur, so er slík skriving tó ikki nakað, sum ávirkar venjararnar. Teir seta liðið eftir síni sannføring, og so mugu vit síggja, hvat teir koma til.

Skoraðu ov tíðliga

Fyri trimum árum síðani var føroyska liðið eisini í Sveis. Ta ferðina fekk liðið eina dreymabyrjan, tá John eftir fáum minuttum skoraði til 1-0, men síðani gekk minni gott. Sveisar vunnu dystin 5-1, og mest um alla tíðina var talan um ógiligt trýst á føroyska málið.

Spurdur, hvørt føroyska liðið kann nýta tann dystin til nakað í dag, heldur John ikki, at tað er so øgiliga aktuelt, men hann roknar tó við, at trýstið kann gerast tað sama.

- Skulu vit læra nakað av tí dystinum, so má tað vera, at vit ikki skulu skora ov tíðliga, tekur hann skemtandi til.

- Vit vóru eisini undir stórum trýsti, longu áðrenn vit skoraðu, og hóast vit so løgdu okkum á odda, so tóktist tað ikki nerta teir tað allar minsta. Teir fáa so eisini okkurt heppið mál, og so gera vit brotssork í hópatali og fáa ein mann útvístan, so støðan kundi helst verið enn verri. Tað var jú eisini 5-1 hampuliga tíðliga í dystinum, minnir John á.

Kann tann dysturin eisini gera, at sveisarar hesa ferð fara at undirmeta føroyska liðið?

- Tað kann væl vera. Teir kunnu helst eisini lesa stigatalvurnar frá seinastu undankapping og síggja, at teir eiga at vinna dystin. Tað kann kanska gera, at teir taka eitt sindur lætt upp á uppgávuna. Tað vóna vit í øllum førum, at teir gera, og so er tað upp til okkum at gera okkum dælt av tí, sigur John Petersen at enda.

- Hetta tykist vera ein flokkur av góðum monnum, sum vilja stríðast fyri hvørjum øðrum, sigur Claus um nýggju liðfelagarnar

Spennandi

Claus Bech Jørgensen metir talan vera um eina sera spennandi avbjóðing. Men hann ásannar samstundis, at talan er um sera stóran bita hjá føroyska liðnum

LANDSLIÐSPRÁT
Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

Basel, Sveis: Einki er at ivast í, hvør maðurin var, sum fjølmiðlarnir vildu hava fatur á, tá føroyska venjingin var av fyrrapartin mikudagin.

Fyri fyrstu ferð hevði samlaða pressan møguleika at hitta nýggja mannin í føroyska landsliðshópinum, og Claus Bech Jørgensen tóktist sum so heldur hava nakað ímóti hóvastákinum, sum var kring hansara persón.

Hálvi vestmenningurin var fyrikomandi og gav sær góðar stundir at práta við ymsu miðlarnar, og tó at leikarabussurin hesaferð mátti bíða nakað longri, enn hann vanliga ger, so tóktist hetta tó ikki at nerva hálva vestmenningin ella hinar í hópinum.

Kennir einki

Og tað stóð skjótt greitt, at Claus Bech Jørgensen gleðir seg um møguleikan, sum hann nú hevur fingið, og eins greitt tykist tað, at hann longu nú kennir seg heilt væl í hópinum.

- Hetta tykist vera ein flokkur av góðum monnum, sum vilja stríðast fyri hvørjum øðrum. Nú veit eg ikki ordiliga, hvørjar vónir eg hevði gjørt mær um leikliga støðið, men venjingin gekk í øllum førum fyri seg í einum góðum tempo, var svarið, tá vit spurdu hann, hvat honum dámdi føroyska liðið.

Sjálvur viðgekk hann tó, at hann ikki hevði sæð nakað serligt til føroyska liðið.

- Eg havi sjálvandi fylgt við úrslitunum, tá landsliðið hevur spælt, men eg havi sum so ikki sæð liðið spælt dystir. Føroyskur fótbóltur er jú ikki tað, sum tey vísa mest av í Onglandi, heldur hann skemtandi fyri.

Men hóast hetta, so er hann í øllum førum fullgreiður um, at talan verður um truplar uppgávur, sum standa fyri framman.

- Tað kann sjálvandi væl vera, at vit gera okkurt óvæntað, men talan verður um tveir sera truplar dystir. Vit skulu í øllum førum vera sera væl skipaðir, um vit skulu standa okkum.

Vónir um spælitíð

Einki er at ivast í, at nýggi maðurin fer at fáa pláss á liðnum, og sum støðan er nú, so bendir alt á, at hetta verður í álopinum. Annars hevur Claus fyri tað mesta leikt á miðvøllinum, men sjálvur tykist hann ikki hava nakað ímóti, um talan verður um pláss í álopinum.

- Eg kann jú ikki sjálvur velja, hvar eg skal spæla. Fái eg ein dyst, so eri eg takksamur. Og um tað er í álopinum ella á miðvøllinum, er ikki so týðningarmikið. Eg havi í øllum førum roynt bæði, so um venjarin vil hava meg har, so verður tað tað.